

# HB hevur eitt B36 kompleks

*Framrœttaðu HB leikararnir høvdu tað trupult av hart arbeiðandi B36 liðnum*
Mynd: Heðin Weihe · www.hb.fo

**Staðfestingin kom eftir 77 minuttir. HB verjan roynur at rudda burtur. Bólturin gongur høvd av høvdi hjá HB verjuni, áðrenn bólturin dettur fyri føturnar á hvítkladda klaksvíkinginum við 23-talinum á rygginum. Við høgra beini sendir Hjalgrím Elttør bóltin við kós ímóti handara málhorni og sekundi eftir er hvíti parturin av Gundadali á gosi. B36 hevur enn eina ferð vunnið á grannanum fyri norðan**

Tróndur Arge

B36 hevur av álvara sett seg á Havnina, tá tað kemur til at spæla grannauppgerðir ímóti HB. Tað er eftir hondini fleiri ár síðani HB vann á grannunum fyri sunnan. Veðrið var av tí allarbesta tá leikararnir koma á vøllin, men tað er synd at siga tað sama um fótbóltsspælið í fyrra hálvleiki. Tað var einki minni enn eitt satt vónbrot av eini grannauppgerð, sum B36 og HB spældu teir fyrstu 45 minuttirnar. Tað var ilt at síggja, at HB eltir NSÍ oddinum og at B36 hoyrir heima omanfyri 8. plássi, sum teir fingu í fjør.

- Tað ljóðar sum ein klishe, men tað var umráðandi fyri okkum, at vit standa væl á vøllinum í fyrra hálvleiki. Tað gjørdu vit og HB hevur trígjar vandamiklar framherjar og tað eydnaðist okkum at fáa teir úr spælinum. Tað er lítið vit síggja til Andrew av Fløtum, Símun Samuelsen og Rógva Poulsen, so tað eydnaðist væl. Sum tíðin gekk, so fingu vit meira tak á dystinum, so tað formaði seg væl fyri okkum, sigur Sigfríður Clementsen

### Betri seinni hálvleikur

Seinni hálvleikur byrjaði betri og bæði liðini høvdu onkrar vandamiklar møguleikar. Fyri B36 var Stig-Roar Søbstad um at gerast leysur í fimm metrinum, men Tórður Thomsen vardi væl fyri í HB málinum. Fyri HB hevði Rógvi Poulsen tvær góðar skot royndir, men fyrru ferðina stóð ein HB-ari í vegin og seinnu ferðina var tað Jóan Pauli Jacobsen, ið bjargaði í B36 málinum.

- Í seinna hálvleiki fara vit longur fram á vøllin. Vit trýsta HB'arnar, so teir ikki fáa sett spælið líka lætt í gongd. HB skal helst vinna dystin í dag, tí teir skulu renna aftaná NSÍ og tí opna teir dystin tíðliga í seinna hálvleiki. Tað passaði okkum væl og vit fingu eitt nú Hjalgrím Elttør og Christian Mouritsen í fleiri góðar støður, sigur Sigfríður Clementsen.

### Manglandi hugflog í HB spælinum

B36 var nærri við at koma uppá 2-0 enn HB var at javna. HB spælið tókist læst og bar brá av manglandi hugflogi. Miðjan hjá HB við Kára Nielsen, Milan Kuljic og Fróða Benjaminsen hevði torført við at skapa nakað, meðan Rógvi Poulsen og Símun Samuelsen í hvørsínum borið høvdu trupulleikar við at koma framvið B36 verjuni. HB gjørdi eina roynd við at skifta Rókur av Fløtum Jespersen og Levi Hanssen inn, men tað nyttar lítið,

**» Eg eri eitt nú venjari hjá B36 í ár, men eg veit ikki um eg verið venjari komandi ár. Tað haldi eg eri ein trupuleiki**
SIGFRÍÐUR CLEMENTSEN

tá Andrew av Fløtum og Símin Samuelsen fara hinvegin.

- Eg haldi at vit vóru tað betra liðið í dag. Vit vóru grammari og tað er uppiborið at vit vinna. Tá tað so er sagt, so var tað bara eitt mál, ið skilti liðini og málið kom seint, so tað var ein tættur dystur, sigur Sigfríður Clementsen.

### Gera einki øðrvísi

Gera tey í B36 nakað øðrvísi tá talan er um grannauppgerðina ímóti HB, tá teir nú hava so gott tak á teimum?

- Uppgerðin um Havnina er nakað heilt serligt og tá eru leikararnir eyka uppsettir, men vit gera sum so einki øðrvísi til hendan dystin, sigur Sigfríður Clementsen.

### - Trupult at vera venjari hjá B36

Tað er ikki bara ein dansur á rósum at vera venjari hjá B36 fyri tíðina. Tað ásannaði Sigfríður eftir dystin.

- Tað er trupult at vera venjari hjá B36 í løtuni. Liðið skal byggjast upp av nýggjum eftir fíggjarliga niðurtúrin í fjør, men tað krevur eisini at tað er ein plan við tí, sum verður gjørt. Eg eri eitt nú venjari hjá B36 í ár, men eg veit ikki um eg verið venjari komandi ár. Tað haldi eg eri ein trupuleiki, tí ein ikki veit hvat hendir næst. Felagið er í eini "tricky" støðu, tí fleiri leikarar gevast møguliga tá kappingini er liðug og so standa vit eftir við eini tíggju leikarum. So skulu vit aftur til at byggja upp, so støðan er torfør í B36 í løtuni, men felagið hevur stórar møguleikar, sigur Sigfríður Clementsen.

Stutt undan summarferiuni gingu søgur um, at Sigfríður Clementsen varð koyrdur sum venjari hjá B36. Hóast fleiri keldur hjá Sosialinum vildu vera við, at tað var hald í søguni, so er Sigfríður framvegis venjari hjá B36.

- Tá slíkar søgur koma út, tá er tað sum regul okkurt um tað og tað øðiliga keðiligt. Tað er týdningarmikið, at nevndin er loyal og at eg veit hvat eg arbeiði við. Uppá tann mátan er tað irriterandi við søguni, sigur Sigfríður Clementsen.

Tað er langt síðani at HB hevur spælt ein góðan dyst ímóti grannunum og tað gjørdu teir heldur ikki í gjár. Tað var ein tættur dystur, har B36 setti enn meira lív í mytina um eitt B36 kompleks í HB-húsinum.

*trondur@sosialurin.fo*

**» Tá slíkar søgur koma út, er tað sum regul okkurt um tað og tað øðiliga keðiligt**
SIGFRÍÐUR CLEMENTSEN



**Andrew av Fløtum:**

## - Hava kanska eitt B36 kompleks

Tað var annars gamalt, at HB altíð vann á B36, men soleiðis er ikki longur. Nú søgan ein onnur og tað er eftir hondini langt síðani, at HB vann á B36.

- Eg eri heilt ótrúliga vónbrotin í dag. Vit eru ov læstir í okkara spæli og missa bóltin ov lætt. Vit eru kanska ov ótolnir til at spæla tann fótbóltin vit gjarna vilja spæla. Vit vóru bara ikki nóg góðir í dag, sigur Andew av Fløtum um orsøkina til tapið í gjár.

### Vánaligur fyrri hálvleikur

Serliga fyrri hálvleikur var vánaligur og illa spældur.

- Vit royndu at leggja trýst á í fyrra hálvleiki, men tað eydnaðist ikki. Spælið í fyrra hálvleiki var rótut og tað varð sparkað nógv. Tað endaði við at "ping pong" spæli har teir sparka niðan á verjuna hjá okkum og vit tað tað sama hinvegin. Tað var nokk heldur ikki pent at hyggja eftir, sigur Andrew av Fløtum.

### HB roynir at trýsta

HB skapti nakar møguleikar í seinna hálvleiki, men tað var ikki nokk.

- Tað eydnast okkum nøkunlunda at leggja teir undir trýst í byrjanini av seinna hálvleiki, men eitt sindur áðrenn málið byrja vit at missa takið. Tá teir so skora, tá missa vit takið á dystinum, sigur Andrew av Fløtum.

### Ikki uppiborði at tapt

Andrew er ikki samdur við Sigfríði Clementsen, tá hann sigur, at B36 vann uppiborið.

- Vit høvdu ikki uppiborið at vunnu, men tað haldi eg nú heldur ikki at B36 gjørdi, sigur Andrew av Fløtum.

Spurdur um HB hevur eitt B36 kompleks, svarar Andrew soleiðis:

- Tú kann gott siga at vit hava eitt B36 kompleks, men tað merkir ikki at eg ikki gleði meg at møta B36 næstu ferð.